Álit

í

løgtingsmáli nr. 100/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Hægri botnfrádrátt í kommunuskattinum)

Árni Skaale, Bárður á Lakjuni, Beinir Johannesen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur og Jørgen Niclasen, løgtingsfólk, hava vegna Fólkaflokkin lagt málið fram 7. mars 2024 og eftir 1. viðgerð 18. mars 2024 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 2., 18. og 23. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Kommunufelagið, Landsbankan og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu, Hanna Jensen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) ásannar, at ein hægri botnfrádráttur hjá kommununum hevði verið ein háttur at lætta um skattin javnt hjá øllum inntøkubólkum. Hevði verið arbeitt við einum progressivum skattastiga hjá kommununum, sum ikki er partur av hesum uppskotinum, so kundi hetta tilsamans skapt ein lætta hjá lægru inntøkunum, sum ikki gav hægstu inntøkunum líka nógv.

Landsbankin hevur undir hoyringunum víst á, at tað fyri haldførið hjá almennu Føroyum ikki er ein gongd leið at hækka botnfrádráttin hjá kommununum. Serliga tí at ongin fígging er partur av uppskotinum, og tí tað hevði verið ein generellur lætti hjá húsarhaldunum, sum kommunurnar høvdu fingið heimild til, og ikki ein lætti, sum serliga hevði gjørt mun hjá mest sperdu samfelagsbólkunum. Somuleiðis hevur verið víst á, at tað er skilabetri at gera fíggjaði átøk, sum beinleiðis hjálpa teimum ringast sperdu og ikki øllum øðrum eisini.

Meirilutin staðfestir, at hoyringarnar hava víst, at henda heimildin greitt ikki er nakað, sum kommunurnar sum heild ynskja.

Somuleiðis hevur verið víst á, at ein hækking í botnfrádráttinum hjá kommununum hevði verið lutfalsliga dýrast hjá teimum kommununum, ið hava løntakararnar við lægst miðalinntøkum og eisini hava minsta fíggjarliga rásarúmið.

Tað hevur undir hoyringunum eisini verið víst á, at umrøðan millum landið og kommunurnar, millum annað tá eftirmetingin av eldraøkinum varð gjørd, í størri mun hevur snúð seg um at gera eina umskipan, har botnfrádrátturin hjá kommununum verður lækkaður ella strikaður.

Meira er enn ikki komið burturúr hesum samskifti.

Meirilutin viðurkennir, at botnfrádrátturin reelt áhaldandi lækkar orsakað av inflatión og metir, at hesin spurningur kundi verið umrøddur, tá landsstýrið og kommunurnar viðgera sínamillum viðurskifti.

Meirilutin staðfestir sum heild, at rætti mátin at gera broytingar í viðurskiftum millum land og kommunur er í samskifti partanna millum, og ikki við at landið uttan nakað samskifti ger broytingar fyri kommunurnar.

Meirilutin heldur, at landsstýrið í staðin eigur at arbeiða við uppskotum, sum neyvt gera mun fyri teir bólkar, sum eru sperdir av ógvisligu príshækkingunum, ið hava verið seinastu árini.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Kommunuskattaprosentið verður av bygdaráðunum ásett á hvørjum ári, meðan botnfrádrátturin í kommunuskattinum er ásettur við løgtingslóg at vera kr. 30.000.

Við uppskotinum verður heimilað kommununum sjálvar at áseta botnfrádráttin at vera eina staðni í strekkinum frá og við kr. 30.000 upp til og við í mesta lagi kr. 65.000, eins og tær í dag sjálvar hava heimild at áseta kommunuskattaprosent, barnafrádrátt v.m.

Bygdaráðini skulu eftir uppskotinum áseta botnfrádráttin fyri komandi ár í seinasta lagi 1. desember á hvørjum ári.

Kommunuskatturin er hjá nógvum, serliga lágløntum, tann størri parturin av skattinum, ið tey gjalda. Av tí at botnfrádrátturin er lágur í mun til tann hjá landinum, verður borgarin harðari skattaður av fyrst vunnu krónunum. Uppskotið verður enn eitt amboð hjá kommunum at veita ein fíggjarligan lætta eins og við skattaprosenti og barnafrádrátti.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 2. mai 2024

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	